# Havnar Bio

kall
Coca-Cola

UMMÆLI:

## Ein rasandi superwoman

## -Super svartsjúka, men vánaligur filmur.

**Leikandi:**
**Jenny Johnson/G-Girl — Uma Thurman**
**Matt Saunders — Luke Wilson**
**Hannah Lewis — Anna Faris**
**Vaughn Haige — Rainn Wilson**
**Leikstjóri Ivan Reirman.**
**USA 2006, 95 minuttir.**
**Sýndur í Havnar Bio frá 6. oktober.**



**"Hell hath no fury like a woman scorned", so ljóðar eitt orðatak, ið finst hjá Shakespeare og hjá høvundanum William Congreve. Hetta merkir, at eingin er so hevndarhugaður og óndur, sum ein kvinna, vrakað í kærleika.**

**Ummæli**
*Kim simonsen*

Tað er altíð keðiligt at fara frá hvørjum øðrum, men onkuntíð er hetta lívshættisligt sum í filminum "My Super Ex-Girlfriend". Her heldur Matt Saunders (Luke Wilson), at hann endeliga hevur funnið ta perfektu damuna, men hendan Jenny Johnson ( Uma Thurman) er superhetjan G-Girl. Og tá hendan Jenny/G-Girl gerðst meiri og meiri krevjandi, so vil hesin Matt gera tað liðugt við hana, men hvussu er gjørligt at gera tað liðugt við eina kvinnu sum bæði dugir at flúgva, lyfta bilar og brenna hol gjøgnum stál við sínum brennadi termoeygum.
Hendan forsmádda Jenny ella G-Girl vendir sína supermegi móti hesum Matt og ger alt hon kann fyri at oyðileggja at hann fær eitt forhold við starvfelaginum Hannah (Anna Faris).
Matt hevur knúst hennara hjarta og so vil hon sorlað hann sundur. Her er einki at gera. Kvinnan vil hava hevnd.

**Super Girl Super Bitch**
Vit eru von við at Superman, Batman, Spider-Man, Daredevil, X-Men og øll tey gera tað sum er gott. Vit kenna allar hesar flott gjørdu filmarnar, fyltir við teldutøkni og special effects. Nú kemur so ein filmur um eina superhetju, ið er nokso annaleiðis enn hini. Hendan hugsar ikki um at hjálpa fólkum, men um at brúka síni ótruligu evni til at raka ein mann, ið hevur sært hana.
Hendan G-Girl, ið eitur Jenny Johnson, er leiðari á einum listasavni um dagin og annars livir hon eitt dupultlív. Men sum Superman, ið elskar Louis Lane, so er Jenny góð við hendan arkitekturin Matt.

**Ein desperat kvinna**
Tey hittast í undirgrundartokinum ein morgunin. Hann bjóðar henni út, men ikki fyri hann bjargar taskuni hjá henni úr hondunum á einum tjóvi, sigur hon ja. So við og við gerast tey eitt par. Alt tykist so frálíkt at byrja við, men skjótt, so gerst hon alsamt meiri desperat og vanskelig. Sum so nógv fólk í dag, so er hon bæði ráðarík, neurotisk og øvundsjúk.

**Uma Thurman er kool**
Hendan G-Girl, er ikki heilt sum hinar Catwoman ella hetjan frá Kill Bill, ið Uma Thurman spældi eisini – hetta serliga væl. Her er hon meiri vanlig og tí púra annarleiðis enn vanligt er innan superhetju-sjangruna.
Uma Thurman er ein leikari, ið fólk hava virðing fyri, síðani filmin hjá Quentin Tarantino "Pulp Fiction" (1994), har hon fekk ein Oscar fyri hendan leiklutin. Seinni var hon við í bæði "Batman & Robin" (1997), filmin hjá Bille August "Les Misérables" og Woody Allensa "Sweet and Lowdown" (Dur og mol, 1999). Tað var við filmunum "Kill Bill: Vol. 1 & 2" (2003-04), ið vit sóu eina Uma Thurman, ið kom at skriva, ella skera seg við einum samuraisvøri, inn í filmsøguna.
Søgan er eina løtu nokso skeg og alternativ, men sum við øllum slíkum skemtiligum kærleikskomedium, so standa klisjeirnar á rað og bíða uftanfyri. Filmurin koyrir nærum við tað sama í tómgongd og søgan upploysist.
Veit ikki um eg bert havi ein veikleika yvir fyri Umu Thourman, kvinnan er so forbanka kool, at fáar kvinnur tora at spæla so ússaligar sum hon ger her.
Mangan eru special effects í hesum filminum, ið meiri líkjast einum teknifilmi, so sum tá G-Girl blakar ein óðan háv inn gjøgnum vindeyga eftir Matt og damuni.
Sum heild er hetta ein ordans meturvøra av einum filmi, ið ikki heldur ordeliga.

**2 stjørnur av 6.**



TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




**My super ex-girlfriend** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 20.45 | 23.00 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 20.45 | 23.00 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 19.45 | 22.00 |




**Den grimme ælling og mig** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 16.30 | 19.00 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 16.30 | 19.00 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 15.30 | 18.00 |




**Stormbreaker** FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 18.30 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 17.30 |




**Nacho Libre**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 05.10 | kl. 22.00 | Seinasta sýning |




**Click**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 22.30 |




**Over hækken**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 17.00 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 17.00 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 16.00 |




**World Trade Center**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 06.10 | kl. 21.00 |
| Leygardag | 07.10 | kl. 21.00 |
| Sunnudag | 08.10 | kl. 20.00 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**